# Reglugerð fyri stuðul til viðarvøkstur

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetir treytir fyri nýtslu av konto nr. 6.33.2.05 Træplanting.

*Stk. 2.* Játtanin kann nýtast til stuðul til frama fyri viðarvøkstur fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt at verja ímóti jarðarmáan.

## Stuðulstreytir

**§ 2.** Stuðul kann veitast kommunum, einstaklingum, feløgum og virkjum. Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.

*Stk. 2.* Um ikki heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi, kann eingin umsókn fáa játtað meira enn helvtina av samlaðu játtanini í einum fíggjarári.

*Stk. 3.* Stuðul verður bert veittur til verkætlanir, har gróðursetta lendið (t.v.s. tann parturin av einum lendi, ið verður gróðursettur við viðarvøkstri), er størri enn 2.000 m2.

*Stk. 4.* Stuðul skal nýtast til verkætlanir, ið kunnu metast at hava alment gagnligt endamál, og eigur í minst møguligan mun at verða veittur til viðarvøkstur í privatum urtagørðum í sambandi við sethús.

*Stk. 5.* Umsøkjarar, sum hava fingið tilsøgn um stuðul, skulu í seinasta lagi 1 mánað eftir, at tilsøgn er fingin, geva Umhvørvis- og vinnumálaráðnum skrivlig boð um, hvørt stuðulin verður nýttur ella ikki.

*Stk. 6.* Stuðulstilsagnir eru galdandi til 31. desember í stuðulsárinum, sum merkir, at stuðul, sum ikki er nýttur, fellur burtur. Í heilt serligum førum kann tilsagnarfreistin verða longd við upp til 4 mánaðir eftir árslok.

*Stk. 7.* Roknskapur verður latin Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 60 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

**Serligar verkætlanir**

**§ 3.** Tá ið Umhvørvis- og vinnumálaráðið metir tað vera átrokandi, at heilt ávísar verkætlanir verða framdar, kann ráðið seta í verk hesar verkætlanir við fígging útvegað av játtanini til træplanting.

*Stk. 2.* Tá ið Umhvørvis- og vinnumálaráðið setur í verk verkætlanir, kann tað gerast við almennari lýsing í fjølmiðlunum, ella við beinleiðis samskifti við serfrøðingar.

**Umsókn**

**§ 4.** Umsókn um stuðul skal vera Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 1. februar. Lýst verður við hesum í fjølmiðlunum og á heimasíðuni hjá ráðnum www.uvmr.fo.

*Stk. 2.*Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

*Stk. 3.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið "umsóknarblað til stuðul til viðarvøkstur", sum er tøkt á heimasíðu ráðsins. Aðrar viðkomandi upplýsingar fyri umsóknina og verkætlanina kunnu leggjast við sum fylgiskjøl til umsóknarblaðið.

*Stk. 4.* Móttiknar umsóknir verða sendar Umhvørvisstovuni, og, tá ið tað verður mett neyðugt, øðrum viðkomandi pørtum til ummælis.

**Útgjald**

**§ 5.** Stuðulin verður latin sambært treytunum í hesi reglugerð og játtanarlóg landsins. Stuðulin verður útgoldin sambært rokning við skjalprógvum fyri útreiðslum.

**Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer reglugerð til frama fyri viðarvøkstur frá 15. januar 2014 úr gildi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 23. januar 2020

HAbrahamsen
Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/Hilmar Høgenni
deildarstjóri